gult cyan magenta svart

SAMRØ‹A. Ein minutt á›renn vit fara á pallin eri eg um at doyggja og vil bara heim at liggja undir d‡nuni og goyma meg. Men tá vit koma fram á senuna, so er ta› ordiliga ordiliga ordiliga cool, sigur Rannvá Joensen í Creamy

Rebekka og Rannvá í Creamy á palli í Havn 19. februar í ár

Mynd: Jens Christian Vang

Stjørnur í advent

Birgir Kruse

Hey Rannvá, skilir tú føroyskt? Dugir tú at skriva føroyskt?

Ja, eg forstandi væl føroyskt eg dugi væl at lesa føroyskt, men eg dugi ikki at skriva føroyskt. Foreldrini hjálpa mær. Vit snakka føroyskt her heima, so ta› er heilt nemt.

Tykkara n‡ggja Creamy-fløga, hjá tær og Rebekku, hvussu er hon sett saman, fløgan?

Vit hava valt nakrar n‡gjar sangir. 10 n‡ggir og tveir cover - Little Kitty (The Walkers), Never ending Story. Tú veitst sjálvur hvar hetta lagi› er frá. Nógvir ymiskir produsarar eru til teir ymisku sangirnar. Málbólkurin eru tey á mínum egna aldri og eisini tey yngru. Nakrir tekstir passa betri til okkara aldur, haldi eg.

Hvat slag av tónleiki lurtar tú eftir í løtunu, burtursæ› frá tykkara egna altso?

Hanson og Nat King Cole og Frank Sinatra. Back Street Boys. Hetta er ta› , sum eg lurti eftir. Rebekka lurtar ikki so nógv eftir Nat King Cole og Frank Sinatra. Hon er meira forlipt í Hanson og Back Street Boys.

Hevur tú nakrar avísar fyrimyndir, idol?

Mín fyrimynd er m.a. Nat King Cole. Mær dámar so øgiliga væl hansara musikk. Ta› er so lekkurt og mjúkt at lurta eftir. Fyrr lurta›i eg eftir øllum møguligum, t.d. Mariah Carey ella Whitney Huston. Men eg haldi ikki, at tær eru serliga cool longur. Forsangarin í Hanson, hann syngur ræ›uliga væl, haldi eg.

Hava tit møtt nøkrum mega-stjørnum, altso stjørnum sum eru meiri mega enn tit?

Ja, vit hava møtt Brø›runum Olsen, ta› var virkuliga skeg. Og so A-Teens. Teimum møttu vit til Grøn Konsert. Har møttu vit eisini Sanne Salomonsen. Ta› var ordiliga cool. Eg havi eisini heilsa› uppá hann vi› krúllunum - Michael Bundesen. Mamma mín sá hann, tá vit vóru til festival í Skovlunde. Han er eisini ordiliga cool. Eg havi lurta› eftir Shubidua, tá eg var lítil. Mín allarbesti vinur er Dánjal (Danny Kool) eg lurti nógv eftir hansara fløgum. Eisini lurti eg eftir musikkinum hjá Soap. Tær kenni eg væl. Mín yndlingsskuespælari er annars Lone Hertz - og henni havi eg eisini møtt! Eg heilsa›i uppá hana í Aalborg. Hon var á turné og helt fyrilestrar. Mær dámar so væl, at hon virkar so ker og smílandi.Eg havi eisini havt ta stóru æru at heilsa uppá Poul Nyrup! Eg og Rebecca eru á einari mynd saman vi› honum. Ta› var ikki so gali›. Vit møttust í einum ateliéri hjá einum fotografi, sum eisini tekur myndir av kongafamiljuni. Men treytin fyri at fáa myndina av okkum saman var, at hon ikki mátti n‡tast í mi›lunum. Sorry.



So kanska ver›ur Nyrupmyndin eitt samlaraobjekt...men hvat siga tey heima, familjan, til alt ta› hóvastáki›, sum er uttan um tykkum í Creamy?

Familjan heldur, at ta› er spennandi. Tey eru altí› vi›, tá vit eru úti. Antin mamma ella babba. Men altí› annar av teimum. Ta› haldi eg er fínt.

Ta› at tit bá›ar í Creamy eru vor›nar so vælumtóktar, hevur ta› broytt naka› í sambandinum vi› tykkara vinfólk?

Nei, ta› haldi eg ikki. Vit eru nokkso nógv burtur í vikuskiftunum. Men vit ganga í skúla hvønn dag akkurát sum øll hini. Eg eri nógv burtur, men tó fekk eg eitt 13 tal í sí›stu vikuni - í donskum! Mínir skúlafelagir halda, at ta› er nokkso spennandi at vit eru so kendar.

Hevur tú...ehm...nakran sjeik?

Nei!

Tit hava gjørt vart vi›, at tit eru kristnar. Hvussu hevur ta› veri› móttiki›?

Vit hava sagt, at vit eru kristnar og ta› vita øll, haldi eg. Vit hava eisini ein kristnan sang á fløguni. Hann eitur "It can happen to you". Nú, tá vit eru blivnar eldri, vilja fólk gjarna hoyra um at vit eru kristnar. Tey halda ta› er spennandi og annarlei›is, kanska serliga í sangumhvørvinum og eisini tí vit eru so ungar og ikki skammast vi›, at vit eru kristnar. Undan hvørjari konsert bi›ja vit saman vi› dansarunum og hinum. Tey eru ikki kristin, men allíkavæl so bi›ja vit øll saman, á›renn hvørja konsert!

Syngja tit í kirkjum og samkomun, ta› vil siga í kristnum sambandi?

Onkuntí› syngja vit í okkara kirkju her í Aalborg. Men ta› er ikki so ofta.

Hvør skipar fyri tykkara útgávum, sølu, konsertum og so framvegis?

Okkara plátuselskap eitur RecArt (CMC). Tey skipa fyri sølu, reklamu o.s.fr. Annars eitur okkara manageri Andreas Mathew. Hann er stóribeiggi hjá Rebekku. Hann avger alt, sum hevur vi› okkara show at gera. Hvussu pallurin skal síggja út. Hann er altí› vi› okkum. Passar uppá okkum. Vit hava eisini ein booking manager. Fólk kunnu ringja til hansara og booka okkum. Hann avger so, hvar vit fara at syngja og hvat vit kosta.

Forsøma tit ikki skúlan, tá tit eru úti og spæla, ella gera upptøkur?

Vit forsøma ikki naka› serligt, Bara nakrar fáar tímar kanska fríggjadag seinnapart. Vit royna at passa skúlan sum vit eiga og eg haldi ikki, at vit forsøma naka› serligt.

Hvussu eru tykkar framtí›arætlanir? Bangnar, ørkymla›ar, ella heilt avslappa›ar, tá ta› umræ›ur framtí›ina?

Eg ani ta› ikki. Eg eri bara 14 ár! Eg haldi, at eg fari á eftirskúla í tíggjunda klassa. Ta› er um tvey ár. Eg taki ta› sum ta› kemur.

Kunnu vit vænta eina tri›ju útgávu vi› Creamy? Og kanska enn fleiri útgávur...?

Ja, ta› rokni eg vi›.

Fáa tit gó› rá› frá foreldrum, solei›is til dagin og vegin, tá ta› sn‡r seg um framtí›ina?

Ja. Vit hava til dømis tosa› nógv um hetta at "fara internationalt". At fara útum Danmark. Her hava míni foreldur stu›la› mær í tí, sum eg vil og hava hjálpt mær og hjálpa mær framvegis.

Hava tit nakrantí› havt samband vi› nakran, sum hevur veri› í somu stø›u sum tit, altso ung, sum knappliga blíva stjørnur?

Ja, eg havi tosa› nógv vi› Dánjal (Kool) og genturnar í Soap. Tær hava hjálpt mær vi› gó›um rá›um. Tey hava veri› kend nógv longri enn vit, so eg kundi altí› spyrja tey. Eisini tá eg skuldi avgera, um at fara uttanlands. Tær hava já roynt alt hetta, so tá var gott at spyrja tær í Soap, serliga.

Eru nakrar aktuellar ætlanir um at koma til Føroya at syngja?

Beint nú er ikki naka› á skránni. Vit hava ikki veri› úti vi› okkara n‡ggja showi enn, heldur ikki í Danmark. Eg haldi, at ta› hev›i veri› cool at koma til Føroya aftur at halda konsert.

Tit spældi inn ein føroyskan sang fyri Sparikassan. Hvat dámdi tær ta›?

Onkur í Føroya Sparikassa hev›i spurt JOF (ta› er Jens Ole Friis, sum er stjóri á RecArt), um Creamy vildi syngja nakrar sangir inn á føroyskum. Teir, sum høvdu gjørt okkara musikk til ”Æblemand”-fløguna gjørdu musikk og so sungu vit tveir sangir á føroyskum. Ta› var ræ›uliga skeg, tá Rebekka skuldi læra at syngja á føroyskum. Hon sang mest ni›urlagi›, tí hitt tók for langa tí› at læra.

Tit eru vi› í einum n‡ggju donskum teknifilmi "Hjælp jeg er fisk". Fortel um ta›!

Nei, vit eru ikki vi› í sjálvum filminum. Vit hava bara sungi› tittullagi›, sum er á enskum og eitir "Help, I am a fish". Filmurin og sangurin eru komin út í Finnlandi, Svøríki og Norra. Umframt Danmark altso. Vit hava veri› í Finnlandi og Norra og sungi› tann sangin í sjónvarpi har.

Tit vóru vi› í sjónvarpssendingini hjá Keld Heick "Musikbutikken" herfyri. Ta› var eisini sent í føroyskum sjónvarpi. Hvat dámdi tær at upptra›ka á tann hátt?

Vit hava veri› fyrr í sendingini ”Musikkbutikken”. Ta› var skeg. Ta› er líkasum at vera í ”Snurre Snup” sendingini. Kanska er ta› eitt sindur skegari í ”Snurre Snup”. Ta› er skeg at ver›a vi› í sjónvarpssendingum.

Rannvá Joensen í Creamy: Vit ganga í skúla hvønn dag akkurát sum øll hini

Eru tit heilt avslappa›ar og róligar tá tit fara á pallin at syngja?

Altso, ein minutt á›renn eri eg vi› at doyggja og vil bara heim at liggja undir d‡nuni og goyma meg. Men tá vit koma fram á senuna, so er ta› ordiliga ordiliga ordiliga cool. Ta› er so skeg at sigga so nógv fólk syngja vi› og smíla til okkara. Ta› er ordiliga positivt og ta› allarbesta vi› at vera vit!

- Takk fyri práti› og gó›a eydnu vi› n‡ggju fløguni og tykkara framhaldandi virksemi!

Sjálv takk.

Rannvá á føroyskum palli: – Eg haldi, at ta› hev›i veri› cool at komi› til Føroya aftur at halda konsert

Mynd: Jens Kristian Vang